# Leitingin verður kannað

**Nú verða áttamannafarið Hella og gummibáturin, sum varð funnin í síðstu viku kannað av Skipasýninum og Gummibátatænastuni. Hvussu longi kanningin fer at taka, og nær ein niðurstøða verður greið, dugir leiðarin á MRCC støðini, Djóni Weihe ikki at siga**



*Gummibáturin úr Hellu varð funnin út fyri Akrabergstanga fríggjadagin*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

KANNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Nú mugu myndugleikarnir kannað tað, sum er funnið fyri at fáa nøkur svar, sigur Djóni Weihe, leiðari á Sjóbjargingarstøðini.

Hann heldur, at stórur innsatsur varð gjørdur allastaðni fyri at finna gummibátin og mannin, men hann viðgongur tó, at tá hugt verður í bakspeglið, at ein kann gott seta spurnartekin við um ikki tað kundið verðið gjørt meira burturúr leitingini og leitað í eitt longri tíðarskeið. Serliga tá maður og gummibátur vórðu funnin aftur.

– Vit hava altíð leitað longi í Føroyum, tá slíkt hendir, men tað er sera torført at siga, júst hvat er nóg longi ella ov stutt, sigur hann og leggur afturat, at tað er øgiliga ymiskt uttanlanda, hvussu longi tað verður leitað í slíkum tilburðum.

Annars sigur hann, at tað ber illa til hjá honum at koma við nøkrum greiðum svarum um hetta, áðrenn kanningin av málinum er liðug.

## Ikki dumpað

Um niðurstøðan útfrá kanningini staðfestir, at leitingin varð steðgað ov tíðliga, heldur Djóni tó ikki, at tað kann sigast, at MRCC dumpaði sína fyrstu stóru roynd eftir yvirtøkuna.

– Vit hava longu havt nógvar uppgávur, síðani yvirtøkuna, sum hava gingið væl. Hetta var so tann fyrsta so stóra hendingin av sínum slag, sum involveraði nógv fólk. Men fólk hava jú altíð teirra meiningar, sigur Djóni Weihe, sum sostatt ikki heldur, at teirra partur hevur ligið eftir í leitingini.

Hann sigur tó, at reaktiónirnar uppá leitingararbeiðið hava verið positivar heldur enn tað øvugta.

## Tekur sína tíð

Hvussu langa tíð kanningin tekur, og nær svar verða greið, dugir Djóni Weihe ikki at siga nakað um. Ein tílík kanning tekur sína tíð, er tað einasta, sum hann sigur.

Djóni sigur, at um ein tílík kanning skal hava nakað virði, so má hon taka ta tíð, hon tekur. Tey mugu royna at samla so frætt av fakkunnleika, sum tey kunnu, so tey kunnu gera eina niðurstøðu útfrá vitanini.

Umstøðurnar í hesi hending eru heilt serstakar og gera tað serstakliga torført at síggja frammanundan, at júst hatta skuldi henda, sigur Djóni Weihe, leiðari á Sjóbjargingarstøðini.

# So var hon aftur...

**Lítið var at frætta um gomlu Norrønu, áðrenn blaðið fór til prentingar, men mánamorgunin kom gamla Norrøna aftur á Havnina**




*Sum í gomlum døgum: Tað er ikki so langt síðani, at Norrøna 1 kallaðist fyri Norrøna og var stoltleikin í føroyska flotanum. Nú kemur tað í øllum førum væl, at hon ikki varð seld*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

NORRØNA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Um ellivutíðina mánamorgunin stevndi gamla Norrøna ella Norrøna 1, sum hon eisini verður kallað á Havnina. 10. apríl hittust nýggja og gamla Norrøna norðanfyri Hetland - eftir ætlan fyri síðstu ferð. Tá stevndi ein spildurnýggj Norrøna móti Havnini, og Norrøna 1 skuldi bjóðast fram til møguligar keyparar.

Men sum flestum kunnugt rendi nýggja og stásiliga Norrøna á land hósdagin. Tískil er boð sent eftir gomlu Norrøna. Og mánamorgunin var hon á Havnini.

Norrøna 1 skal røkja siglingina hjá nýggju Norrønu til nýggja Norrøna aftur verður klár.

## Lítið at frætta

Seinnapartin mánadagin var sjófrágreiðing í Føroya rætti um tilburðin, tá Norrøna rendi á land hósdagin. Hetta var eftir, at Sosialurin tygum lesa var farin til prentingar.

Tá vit fingu fatur á Kára Durhuus, fjølmiðlaráðgeva hjá Smyril Line, mánamorgunin visti hann ikki nógv at siga okkum.

– Arbeitt verður við skaðanum, sum Norrøna fekk, men vit vita ikki, nær hon kann fara avstað aftur, sigur Kári Durhuus.

Vit hava eisini roynt at fregnast eftir, hvat fyri trygging, ið Smyril Line hevur til Norrønu. Hvørki Kári Durhuus ella Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, vildu siga nakað um hetta. Tað einasta, vit hava fingið upplýst, er, at Norrøna er tryggjað hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Vit hava eina góða eftirtrygging, var tað einasta Gunnar í Liða vildi siga.




# Samstarv er loysnin

## Hesi eru valevnini hjá Sambandsflokkinum

Erika Elttør

Norðoyggjar

Reimund Langgaard

Eysturoy

Bárður Nielsen

Norðurstreymoy

Olav Enomoto

Norðurstreymoy

Karina Fagralón

Norðurstreymoy

Gunnar Nattestad

Vágar

Michael Jensen

Suðurstreymoy

Jóhan Petur Johannesen

Suðurstreymoy

Eydna Vidtfeldt

Sandoy

Sambandsflokkurin
www.samband.fo